# Pamela Anderson er bara fitt

**At Pamela Anderson hevur eina stóra persónligheit og útstráling er ikki nýtt, men tað tykist sum fyrrverandi Baywatch stjørnan eisini hevur eitt sera stórt hjarta.**

Tá Pamela í vikuskiftinum vitjaði í Dublin fyri at handa írska eyðkvæmis hjálparfelagskapinum Open Heart House € 20.000 vegna eyðkvæmis grunnin hjá smyrslfyritøkuni MAC, var nógv fólk komið saman fyri at síggja Pamelu, millum tey nógvu fólkini var ein heimleysur ungur maður. Pamela gjørdi ikki mætari enn, at hon gav honum ein € 20 seðil. Sambært bretska blaðnum The Sun, var ungi maðurin sera glaður um hesa vælgerð. Pamela sjálv vildi tó heldur tosa um góða endamálið við ferðini og segði, at hon helt, tað vera týdningarmikið at sleppa av við stigmaið, ið er rundan um fólk við eyðkvæmi og livrabruna.



*Í bróstinum á Pamelu Anderson bukar eitt stórt hjarta*

# Reese Witherspoon dregur blað í rættin

Oscarvinnandi sjónleikarkvinnan Reese Witherspoon finnur seg ikki í følskum søgum um seg og síni, tí dregur hon nú amerikanska blaðið The Star í rættin. The Star skrivar í seinastu útgávu síni, at Reese Witherspoon er við barn við manni sínum Ryan Philippe. Hetta skuldi sostatt verið triðja barnið hjá parinum, ið frammanundan hava dóttrina Avu 6 ár og sonin Deacon 2 ár. Witherspoon sigur, at hon leggur sak, tí søgan er fullkomiliga uppspunnin, hon hevur ikki gingið í leysum klæðum, tikið nakað upp á ella havt stóran búk. Hon heldur fram, at einasta orsøk, at The Star skrivar hetta er, at alsamt færri fólk tíma at keypa blaðið, og hetta er ein roynd at venda gongdini, sigur Sky News.



*Reese Witherspoon vann ein Oscar fyri leiklutin sum June Carter í Walk The Line*



## BRITNEY SPEARS ER MYRKHÆRD

Britney Spears tók aftur heimin á bóli fríggjadagin, tá hon í New York vísti seg alment við kolasvørtum hári. Tað at vera ljóshærd hevur verið ein sera stórur partur av øllum konseptinum Britney Spears alla hennara yrkisleið. Men við einum barni í armunum stórum búki og svørtum lokkum tyktist Britney veruliga at royna at bróta niður tí mynd, ið fólk hava av henni. Í blaðheiminum, verður nýggi hárliturin sæddur sum enn eitt tekin, um at tað gongur illa millum Britney og mannin Kevin Federline, tí sum blaðkvinnan á The Sun so beinrakið skrivar. Tá samlívið skinklar, fer konan til hárskera.

*Ein myrkhærd Britney Spears í New York*

## ROBBIE WILLIAMS TÓK OV UNGA GENTU VIÐ SÆR HEIM

Tá Robbie Williams fyri stuttum var í Suðurafrika og gjørdi upptøkur til sítt nýggjasta sjónbandalag Sin Sin Sin, mundi hann brotið lógina. Í býnum hitti hann eina fitta gentu, ið hann bjóðaði við sær heim. Hóast gentan ikki sá so ung út, vísti tað seg, at hon var undir kynsliga lágaldurin. Frisørurin hjá Robbie Williams fekk ávarað sangaran, áðrenn hann hevði gjørt nakað ólógligt, og gentan varð send heim. Gentan hevði sagt frisørinum, at hon skuldi í skúla dagin eftir, og hesin fekk soleiðis mistanka um unga aldurin, skrivar svenska Aftonbladet. Robbie Williams segði aftan á hendingina, at hann var glaður um, at einki var hent, tí tað ivaleyst ikki hevði verið gott at verði tikin fyri tílíkt í Suðurafrika.



*Robbie Williams vildi helst ikki í fongsul í Suðurafrika*

